KOMIÐ

2 3 JUNI 2006

Ár 2006, hin 26. apríl kl. 1400 varð Landbúnaðarstevnan fyri Streymoyar Sýslu sett í bygdahúsinum í Hósvík við Regin Jespersen, sýslumanni sum formanni saman við nevndarlimunum Heina á Heygum, Vestmanna og Onnu Rubeksen, Velbastað, sum bæði eru góðkend.

Til viðgerðar var mál. J.nr. 56P4-88250-00001-05 – kæra frá Sunda Kommunu dagfest hin 19. januar 2005 um avgerðina hjá Garðasýninum í Hósvík, dagfest 30. desember 2004 um at áleggja Hósvíkar Kommunu at gera rørportur um Vørðuvegin í Hósvík.

Fyri Sunda Kommunu (fyrr Hósvíkar Kommuna í.s.v. samanlegging av kommunumum) møtti: Sverri Mikalsen, tekniskur leiðari hjá Sunda Kommunu og Trúgvi Joensen. Hvalvík.

Vegna Garðasýnisnevndina møttu: Torbjørn Sæbúð og Hans Pauli Olsen, báðir Hósvík. Triði Garðasýnislimurin var til skips.

AVRIT

Partarnir samdir um at stevnan var lógliga lýst.
Eingi mótmælir um møguligan gegnistrupuleika.
Kærarin fastheldur kæruna.

Sýslumaðurin framlegði hesi skjøl:

1. Kæra frá Árna Hansen, Hósvík, dagfest 23.11.03 til Hósvíkar Kommunu.
2. Fundarfrásøgn dagfest 17.12.2003 – Hósvíkar Kommunustýrisfundur.
3. Skriv frá Hósvíkar Kommunu dagfest 19-12-03 til Árna Hansen.
4. Skriv frá Hósvíkar Kommunu dagfest 22.12.2003 til Garðasýni v/Eivind Clementsen,Hósvík.
5. Skriv frá Árna Hansen, Hósvík dagfest 14.06.04 til Garðasyni í Hósvíkar Kommunu.
6. Skriv frá Garðasýninum í Hósvíkar Kommunu, dagfest 30-12-04 til Hósvíkar Kommunu.
7. Fundarfrásøgn frá Sunda Kommunu dagfest 18-01-2005.
8. Skriv frá Sunda Kommunu dagfest 19. januar 2005 til Landbúnaðarstevnuna fyri Norðstreymoyar Sýslu.
9. Skriv frá Landbúnaðarstevnuni fyri Streymoyar Sýslu dagfest 2. februar 2005 – móttøkuváttan.
10. Skriv frá Sýslumanninum fyri Streymoyar Sýslu, dagfest 29. mars 2006 – kunning um Landbúnaðarstevnuna.
11. Lýsingin – dagfest 3. apríl 2006.
12. Umbøn til kunngerðaran í Sunda Kommunu um at seta lýsingina upp dagfest 30.mars 2006.
13. Váttan frá Sunda Kommunu um at lýsingin hevur verið uppi røttu tíðina.

Áðrenn víðari viðgerð á landbúnaðarstevnuni, var avgjørt at fara at hyggja at umstøðunum á/við Vørðuvegin og Giljavegin, sum báðir eru nevndir og samanbornir í kæruni. Við vóru øll tey møttu á landbúnaðarstevnuni, umframt ein av eigaranum av haga við Giljavegin, Petur Danielsen, bóndi.
Staðfestast kann at bæði Giljavegur og Vørðuvegur eru smælir sonevndir uppdyrkingarvegir, og kunnu ikki metast sum ferðsluvegir, tí har ferðast bert ánararnir eina 2 – 3 ferðir um dagin.
Við Giljavegin liggja 2 gerðir, annað privat ogn og annað kongs.
Við Vørðuvegin liggja 3 gerðir, sum øll eru privat ogn.
Nevnast skal her, at fyri 2 – 3 árum síðan bleiv avgjørt at vetrafriða bøðin í Hósvík, og bleiv síðan sett upp eitt "bygdahegn", sum kom at ganga tvørturum báðar teir nevndu vegirnar.
Árni Hansen, Hósvík, sum av fyrstantíð sendi kæru inn til Hósvíkar Kommunu, hevur eitt gerði við Vørðuvegin, og áðrenn vetrarfriða bleiv og "bygdahegnið" bleiv sett upp, lá hansara gerðið innan fyri bøgarðin í Hósvík, og hann kundi sostatt tá ótarnaður ferðast til og frá ogn síni, uttan at skula noyðast at lata nakað portur upp og aftur. Hetta bleiv ikki trupuleikin fyrr enn "bygdahegnið" bleiv sett upp, og tí kæran frá honum til Hósvíkar Kommunu.

Staðfestast kundi eisini, at rørportrið, sum er tvørturum Giljavegin, og líkasum bleiv brúkt sum "póvgrund" í málinum um, at eitt rørportur sostatt eisini átti at verða gjørt um Vørðuvegin, nú liggur "óvirkið", tí "bygdahegnið" er sett upp nakað vestan fyri nevnda rørportur.

Umboðini hjá Sunda Kommunu kundi upplýsa, at tað var ætlanin at taka nevnda rulluportur burtur, tí tað hevur víst seg, at tá ið kavi er, so fyllast tey við kava, og tæna tá ikki tí endamálið tey í verunleikanum skulu hava.
Eisini bleiv nevnt, at skulu nýggj rulluportur gerast, kosta hesi um. Kr. 100.000,- fyri stykki, so tað eru ongar ætlanir um at gera nøkur nýggj rulluportur.

Garðasýnismenninir upplýstu, at tann størsti trupuleikin var, at portrini ofta vóru sett opin av fólki, sum gingu um portrini.

Fari var síðan aftur í Bygdahúsið, har partarnir fingu orðið.

**Sýslumaðurin** greiddi frá teim skjølum ið hann framlegði.

**Kærarin** – Umboð fyri Sunda Kommunu upplýstu, at tað var kanska ikki heilt greitt, hvussu "bygdahegnið" skuldi ganga við Giljavegin, men tað var eingin ivi um, at nevnda rulluportur um Giljavegin, bleiv tikið burtur, og verandi portur, sum var sett um Giljavegin bleiv ein varandi loysn.
Viðv. portrinum um Vørðuvegin, so bleiv hetta eisini ein varandi loysn, um enn portrið helst átti at betrast, men tað var eingin ætlan um at gera rulluportur um Vørðuvegin, og víst varð annars á tørvin í mun til kostnaðin (cost-benefit).

**Hegnsýnið** framførdi at teir vóru ónøgdir við sjálva gongdina í málinum. Teir vóru ongantíð eftirspurdir ella kunnaðir í samband við at "bygdahegnið" var sett upp, og annars um tær loysnir ið Hósvíkar/Sunda Kommuna vóru komnar til.
Teir framløgdu kort yvir hvussu bøgarðurin gekk og hvussu "bygdahegnið" gekk, men av tí at hetta kortið ikki var heilt í trá við verunleikan, var hetta ikki tikið við sum skjal í málinum.

# ÚRSKURÐUR

Við skrivið dagfest 19. januar 2005 kærir Sunda Kommuna avgerðina hjá Garðasýninum í Hósvík um at teir áleggja Sunda Kommunu at gera rørportur um Vørðuvegin.

**Kærarin** krevur at avgerðin hjá Garðasýninum í Hósvík verður sett úr gildi og at málið verður tikið uppaftur til nýggja viðgerð, har kæran verður frávíst.
Gjørt verður greitt, at tað eru ongar ætlanir um at gera rørportur um Vøruvegin og at rørportrið, sum er um Giljavegin, og sum verður nýtt sum próvgrund fyri, at rørportur eisini eigur at gerast um Vørðuvegin, er burtur, tí "bygdahegnið", sum nú er sett upp, er sett upp vestanvert nevnda rørportur, og er rørportrið soleiðis ikki í nýtslu longur. Ætlanin er at beina hetta burtur í næstum, men teir kundu tó ikki siga hetta sum 100 % víst.
Av tí at bæði umboðini frá Sunda Kommunu vóru "nýggjir" í málinum, og at málið upprunaliga byrjaði áðrenn Hósvíkar Kommuna kom uppí við samanleggjing til Sunda Kommunu, var málið tí nakað ógreitt hjá teimum.

**Garðasýni** fasthelt síni krøv til Sundakommunu, og framførdi teirra ónøgd um, at tað var gingið uttanum Garðasýni, tá ið avgerðir vóru tiknar um hvussu skuldi farast fram í samband við uppsetan av "bygdahegninum ", tá í bøðurin/bygdin Hósvík bleiv vetrarfriða.

**Landbúnaðarstevnan** er av teirru metan, at báðir teir nevndu vegir kunnu metast sum uppdyrkingarvegir, við eini sera avmarkaðari ferðslu. Vanliga eru tað bert eigararnir av haga og gerðum, sum hava sína dagligu gongd um nevndu portur – eina 2 – 3 fer dagliga.
Próvgrundin fyri at rørportur skuldi gerast um Vørðuvegin tí at eitt rørportur er um Giljavegin er ikki longur til staðar, tí rørportrið um Giljavegin sum er er óvirkið og verður tikið burtur sambart umboðini fyri Sunda Kommunu.
Nevndin er metir tí, at nevndu vegir ikki kunnu metast sum ferðsluvegir sambart Girðingarlógina, L. Nr. 171 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um girðing og friðing av lendi, sum seinast broytt við Ll. Nr. 30 frá 17.03.1951 § 15 triðseinasti setningur, og tí kann krav um rørportur ikki koma uppá tal, men bert kravið um at kommunustýrið hevur skyldu at seta upp og halda tey fyri almennari ferðslu neyðugu portur, og at hesi verða gjørd soleiðis at tað, hvørja ferð tað verður latið upp, letur seg sjálvt aftur, (samb. seinasta setning í somu §) Á henda hátt slepst undan at portrini óneyðugt standa opin.
Hetta seinast nevnda verður sostatt eitt krav, sum Landbúnaðarstevnan kemur at seta Sunda Kommunu. Eisini verður kravt, at portrini verða gjørd úr slíkum tilfarið, sterk og á ein slíkan hátt, at frammanfyri nevnda krav kann uppfyllast.
Nevnast kann, at portrið, sum nú er gjørt um Vørðuvegin er sera illa gjørt og portrið um Giljavegin, eigur eisini at gerast soleiðis at tað uppfyllir frammanfyri nevndu krøv.
Ein av próvgrundunum, sum Garðasýn i framførdi, tað at portrini stóðu ofta opin, kann afturvísast, vísandi til krøvini, sum verða sett Sunda Kommunu í samband við ger og uppbygging av portrunum.

Men av tí at málið ikki var nóg greitt lýst av pørtunum og at tað ikki heilt greitt framgekk, hvørjar ætlanir Sunda Kommuna hevur í hesum málið, umframt at Garðasýni hevur verið hildi uttanfyri í viðgerðini av loyns av málinum um "bygdahegnið", verður málið útsett til endaliga avgerð, til hetta greitt fyriliggur.
Landbúnaðarstevnan heitir tí á partarnar – Sunda Kommunu og Garðasýni fyri Hósvík – sum skjótast, um at seta seg niður og í felag at royna finna eina loysn í málinum sum báðir partar kunnu semjast um.

**Freistin verður sett til l. Juni 2006.**

Partarnir verða bidnir um at hava í huga, at endaliga ásetingin hjá Landbúnaðarstevnuni uttan iva verður sum frammanfyri skrivað.

Fundurin lokin kl. 1530.

Málið útsett !

Regin Jespersen, sýslumaður.

**AVRIT**

Ár 2006, hin 20. juni varð Landbúnaðarstevnan fyri Streymoyar Sýslu uppafturtikin í samband við frammanfyristandandi kæru.

Borgarstjóri í Sunda Kommunu, Heðin Zachariasen upplýsti í dag, at Sunda Kommuna ferð at takað tað gamla rørportri burtur í næstum og hevur onga ætlan um at gera nýtt rørportur.
Hann nevndi, at teir koma at hava sama trupulleika í øllum bygdunum í kommununi, og fara teir at gera eitt nýtt rørportur á einum uppdyrkingarvegi í Hósvík, vil hetta skapa fyrimynd fyri allar uppdyrkingarvegir í hinum bygdunum í kommununi.
Tað er einki frætt frá hegnsýnisnevndini, hóast skrivliga var biði um viðmerking frá teimum.

## Àsett verður:

Avgerðin hjá Hegnsýninum í Hósvík verður afturvíst.

Álagt verður ístaðin Sunda Kommunu at kommunan, í seinasta lagi 1. oktober 2006 ger nýggj portur um Giljavegin og um Vørðuvegin vísandi til Ll. Nr. 171 frá 18.05.1937 fyri Føroyar um girðing og friðing av lendi, sum seinast broytt við Ll. nr. 30 frá 17.03.1951 § 15 – har m.a. stendur, at kommunustýrið hevur skyldu at seta upp og halda tey fyri almennari ferðslu neyðugu portur, og at hesi verða gjørd soleiðis at tað, hvørja ferð verður latið upp, letur seg sjálvt aftur. Eisini verður ásett at nevndu portur skulu gerast sterk og á ein slíkan hátt og úr einum slíkum tilfarið, at tey kunnu nýtast uttan stórvegis trupulleika ella ampa fyri brúkararnar

Tær útreiðslur, sum hava staðist av málinum, verður álagt Sunda Kommunu at gjalda eftir uppgerð frá sýslumanninum.
Hesar verða at gjalda innan 14 dagar frá avgerðardegnum.

Avgerðin hjá Landbúnaðarstevnuni fyri Streymoyar Sýslu kann inna 3 mánar frá avgerðardegnum – 20. juni 2006 at rokna – kærast fyri Yvirlandbúnaðarstevnuna, C. Pløyensgøta 1, FO-100 Tórshavn.

Málið lokið.

Regin Jespersen,
sýslumaður.